VB-VÍF 25-16 (13-9):

VÍF fekk bank

VÍF fekk fyrsta avsmurningin í fleiri ár, tá tær vitjaðu í Vági, har ein sera væl skipað VB verja stóð fyri mest sum øllum, sum VÍF royndi
Mynd: Áki Bertholdsen

Væl smurda VB-maskinan snøgt sagt vant burtur úr VÍF sunnudagin, og nú tykist gullvegurin at liggja púrasta opin hjá VB

KVINNUHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Ein av absolutt avgerandi – kanska tann avgerandi – í FM-stríðnum í kvinnuhondbólti var leiktur í Vági sunnudagin, tá VÍF kom á vitjan. Meistararnir tey bæði seinastu árini hava í ár havt eitt sindur trupult við at liva upp til avrikini frá seinnu árunum, og tó at spælið onkun tíð hevur verið ein fragd fyri eyga, so 45u óneyðug stig tveitt burtur aðrastaðni, og tí hevur liðið ongan tíð megnað at vunnið seg heilt fram í oddin.

VB fann slóðina

Her hevur VB sitið so hampuliga trygt alt árið, tó at munurin onkun tíð er tódnaður nakað nógv. Eitt sindur løgið hevur tað verið, at hóast góðu gongdina í úrslitunum, so hevur VB sera sjáldan rakt stórspælið, sum hevur gjørt tey til kanska mest undirhaldandi liðið seinnu árini. Heldur hevur tað í fleiri dystum verið ein blanding millum sterkast útlendingar og stríðsanda hjá hinum leikarunum, sum hevur borið sigrarnar við sær, men sunnudagin rakti VB aftur á slóðina.

Vi útgangsstøði í eini krútsterkari verju og einum væl leikandi málverja setti VB tað so fyrr eyðkenda kontraspælið í gongd, og tá hetta ikki altíð var gjørligt, royndu tær í stóran mun at sýna umhugsni í álopspartinum, tó at tað her gjørdist talan um fleiri villur av tí meira óneyðuga slagnum.

Hesar kostaðu tó sjáldan nakað serligt, og hampuliga skjott stóð greitt, at her skuldi vilja meira enn væl til hjá VÍF, um nakað skuldi spyrjast burturúr dystinum. Eitt skifti í fyrra hálvleiki høvdu tær eisini hug til at taka seg nakað innaftur á VB, men tá VB so aftur togaði, tóktist VÍF mest sum maktarsleyst.

Mansverjan hjálpti ikki

Seinna umfarið var greitt, at VÍF mest sum ikki visti sær nakran útveg. Roynt var við mansverju av teimum báðum útlendsku, Daivu og Redu, hjá VB, men hetta gav bert betri pláss hjá kviku heimligu leikarunum. Og tá VB framhaldandi helt eins væl fast í verjupartinum, øktist munurin bara.

Sum minuttirnir gingu gjørdist alt meira greitt, at talan skuldi gerast um ein rættiligan stórsigur til VB, og sjálvt VÍF-leikararnir máttu ásanna, at hetta ikki var, sum tað plagdi at vera.

Hóast avgjørt, so slapst ikki heilt undan dramatikki seinastu løtuna. Í eini gjøgnumbrotsroynd varð Daiva Toumaite tikin nakað harðliga, og hetta fekk alla høllina, sum hon var, í kók. Vágbingar vóru í øðini um, at leikur skuldi fara so harðliga fram, nú alt kortini var avgjørt, og tey vóru eisini alt annað enn væl nøgd um, at dómararnir ikki revsaðu hetta við reyðum korti. Hvussu var og ikki, so hildu dómararnir ikki, at revsingin skuldi vera nøkur serlig, og við sinninum í kók kundu vágbingar hóast alt fegnast um, at tey nú eiga avgjørt fremsta kvinnuliðið í landinum.

Vegurin opin

Og nógv bendir á, at vegurin til gullmerkini nú liggur opin fyri VB. Tær eru nú tvey stig framman fyri VÍF, og hava ein dyst til góðar, so í so máta áttu fortreytirnar at veri til staðar.

Enn eru tó fleiri torførir dystir á skránni, og hesir fara fyrst og fremst at vísa, í hvønn mun VB er fært fyri at átaka sær favorittleiklutin. Fyrstur av hesum er uttan iva tann í Havn móti Kyndli, har VB ofta hevur havt stórar trupulleikar, men har tær vunnu greiðan sigur í grundspælinum. Síðani tá hevur Kyndil tó fingið meira ferð á, og tí verður spennandi at síggja, hvussu leikur fer.

Undan hesum verður tó talan um steypafinalu. Tá verður mótstøðuliðið aftur VÍF, og einki er at ivast í, at vestmenningar til ta tíð vilja prógva, at tær framvegis hava nakað at siga, meðan VB hinvegin skal prógva, at tær veruliga eru fremsta liðið í landinum.

Dysturin í tølum

VB-VÍF 25-16 (13-9)
Málskjúttar:
VB: Reda Kurkaskiene 7 (3), Laila Jepsersen 6, Gurið Mortensen 5, Daiva Toumaite 4, Arnleyð Hjlem 2, Rannvá Augustinussen 1
VÍF: Sóley Mikkelsen 5(3), Alis Høghamar 3, Jacklin Durhuus 3, Nicoleta Radu 3, Fríða Marjunardóttir 1, Nicolina Eyðbjørnsdóttir 1
Brotskøst: VB 4, VÍF 4
Útvísingar: VB 1
Dómarar úr H71: Jákup Símun Simonsen & Hallur Danielsen.

Messias og NSÍ eru heilt nær

Enn er endalig avtala ikki fingin upp á pláss, men formaðurin hjá NSÍ metir sjálvur, at hetta fer at koma í rættlag

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

NSÍ hevði í fjor sítt besta kappingarár nakrantíð, tá tað eydnaðist besta mansliði felagsins at vinna gull í steypakappingini umframt silvur í landskappingini.

Í vetur hevur liðið tó verið fyri hampuligari stórari frágongd, og enn eru tey í Runavík tí kanska í iva um, hvat tey skulu rokna við komandi kappingarárið. Serstakliga tykist verjuparturin tunnur, eftir at tríggir av berandi leikarunum her hava boðað frá, at teir ikkiv verða á liðnum komandi árið. Arnfinn Langgaard og Djóni N. Joensen hava báðir boðað frá, at teir ikki longur hava møguleika at røkja skyldurnar, sum fylgja við fyrstudeildar fótbólti, og Pól Thorsteinsson verður í B36 komandi árið.

Enn hevur verið heldur smáligt við tilgongdini, men nú er so líkt til, at B68 fær í øllum førum ein nýggjan verjuleikara. Talan er um Messias Perreira, sum seinastu fimm árini hevur leikt við B68.

Enn er ikki nøkur endalig avtala gjørd millum partarnar, men tá vit sunnukvøldið fingu orðið á formannin í NSÍ, Jákup Mortensen, tóktist hesin vera hampuliga bjartskygdur.

- Eg kann so bara vátta, at vit hava tosað við Messias, og hann tykist vera áhugaður í koma hendan vegin. Enn er so einki endaligt avtala, men eg rokni við, at vit fáa hetta í rættlag, soleiðis at hann verður partur av hópinum komandi ár, sigur Jákup Mortensen, og leggur afturat, at hetta sum so verður einasta innkeypið hjá NSÍ í ár.

- Í løtuni er so einki annað á tapetinum. Vit hava fingið onkrar leikarar viðaftur, sum áður hava verið partur av besta liðnum, men í aðrar mátar verður helst ikki talan um tilgongd, so tað verður fyrst og fremst við okkara egna fólki, at vit nú fara at royna okkum, sigur formaðurin at enda.

Mjølnir-ÍF 3-0 (25-15, 25-19, 25-12):

Full ferð á Mjølni

Har var eingin ivi, tá ÍF var í Klaksvík. Mjølnir var fleiri klassar omanfyri, og hava við sigrinum lagt seg einsamallar á odda í bestu kvinnudeildini
Mynd: SáH

Við sigrinum á ÍF hava kvinnurnar hjá Mjølni nú lagt seg einsamallar á odda í bestu kvinnudeildini

KVINNUFLOGBÓLTUR
Jákup Mørk

Flogbóltsfepurin er av álvara um at raka Klaksvíkina. At Mjølnir ikki eigur umboð í finaludystunum, nú steypakappingin um stutta tíð skal avgerast, mundu mong taka sum tekin um, at onnur feløg hava yvirhálað sigursvandu klaksvíkingarnar, men enn hava hvørki kvinnur ella menn givið koyrt væl seinastu dystirnar, riggaðu aftur hesa ferð til fulnar, soleiðis at tær alla tíðina høvdu ÍF undir stórum trýsti, og tá eingi mótvápn vóru at hóma, gav ÍF so spakuliga skarvin yvir.

Einki avgjørt

Sum vera man, so var hýrurin í Klaksvík góður eftir greiða sigurin, men hóast tapið, so tóktust tær í ÍF als ikki at hava mist alla vón.

- Enn er so einki avgjørt. Hatta var bara ein av hasum døgunum, tá einki gongst eftir vild, og móti einum liði sum Mjølnir verður liðið revsað alt fyri eitt, um ikki alt riggar, heldur Annika Rasmussen hjá ÍF.

Soleiðis er líkt til, at ÍF í løtuni er um at raka okkurt slag av niðurtúri, nú bert skarvin yvir.

Klassamnur

Við sigrinum á TB herfyri syrgdu kvinnurnar hjá Mjølni fyri, at dysturin um FM fyrst og fremst skuldi standa millum tær og ÍF, og leygardagin var so oddadystur á skránni, tá ÍF kom á vitjan.

Og skal metast eftir hesum, so er eingin ivi um, at Mjølnir nú er stórfavorittur at vinna FM. Snøgt sagt, so vundu tær burtur úr ÍF, og tað var sjáldan sjónligt, at talan her skuldi verið tvey javnt sterk lið, sum stríðast um FM. Móttøkurnar hjá Mjølni, sum hava tvær vikur eru eftir til steypafinaluna, men somikið svartskygd tykist Annika tó ikki at vera.

- Nú fáa vit at síggja. Komandi vikuskifti hava vit Fleyr á heimavølli, og tað skuldi helst givið nøkur stig. Síðani kemur steypafinalan, og í landskappingini eiga vit enn heimadyst móti Mjølni tilgóðar, so har er einki avgjørt. Vit hava framvegis møguleikan at enda ovast, men so hava vit ikki ráð at missa nógv afturat. Hvør tann einasti dystur telur, og vit verða snøgt sagt noyddar at geva okkum fult út hvørja ferð, og so síggja, hvussu langt tað røkkur, sigur Annika at enda.

TB-Fleyr 3-0 (25-11, 25-19, 25-11):

TB eltir møguleikanum

TB greiddi sín setning í oddastríðnum, tá tær vunnu tryggan sigur á Fleyr

KVINNUFLOGBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað er einki at ivast í, at støðan í løtuni er heldur øðrvísi enn ætlað hjá føroyameistarunum úr TB. Undan kappingini varð roknað við, at tær skuldu hava ein aktivan leiklut heilt frammí í oddinum, og tó at tær enn ikki eru heilt afturúrsigldar, so er teirra leiklutur í løtuni partvíst avmarkaður til áskoðaraplássini í oddastríðnum. Her mugu tær nevnliga bíða eftir, hvussu innanhýsis dystirnir millum Mjølnir og ÍF spæla av, fyri síðani at greiða sína skyldu í øllum teimum eftirverandi dystunum. Og enn hava tær so greitt hendan seinasta setningin.

Leygardagin var tað Fleyr, sum var á vitjan á Tvøroyri, og her var ongan tíð nakar ivi. Leikliga gjørdist talan ongan tíð um ta stóru upplivingina, men uttan at tær veruliga spentu seg út, eydnaðist TB at vinna ein sannførandi sigur.

Við hesum halda tær altso framvegis stutt tjóður í oddinum, og nú er so bara at seta vónina á ÍF. Skal TB enda fremst, er nevnliga ivaleyst neyðugt við einum ÍF-sigri á Mjølni í seinna dystinum teirra millum, umframt at TB skal vinna heimadystirnar móti teimum báðum oddaliðunum. Ein møguleiki er sjálvandi eisini, at Fleyr, KÍF ella Dráttur taka stig frá oddinum, men soleiðis sum kappingin er háttað tykist hetta ikki serliga sannlíkt. Heldur ikki hóast Dráttur argaði ÍF í grundspælinum.

Undan hesum hevur TB tó eisini steypafinaluna at hugsa um. Hon verður ímóti ÍF annað vikuskifti, og lítið er at ivast í, at nú møguleikin fyri FM tykist fjarða nakað, fara tvøra-kvinnur at leggja nógv fyri í royndum at vinna tann dystin.

KÍF-Dráttur 0-3 (11-25, 20-25, 23-25)

Niðurflytingin tykist staðfest

Við tapinum fyri Drátti tykist tilveran hjá KÍF í bestu deildini av á hesum sinn

KVINNUFLOGBÓLTUR
Jákup Mørk

Eftir at tað eitt skifti í grundspælinum sá hampuliga ljóst út, hava seinastu vikurnar bent alt meira á, at tilveran hjá KÍF sum fyrstudeildarlið var av á hesum sinni.

Ikki minst eftir tapið fyri Fleyr í fyrra dystinum millum liðini í endaspælinum hevur hetta tókst sum ein staðfesting, og nú Dráttur eisini slapp úr Havnini við øllum stigunum, tykist seinasta orðið vera sagt í so máta.

Tað er nevnliga so, at skal KÍF vinna seg av niðasta sessinum, so er neyðugt við sigri á Fleyr í seinna dystinum millum liðini, umframt at stig eisini skulu vinnast aðra staðni. Og á pappírinnum var møguleikin fyri hesum seinna í øllum førum størstur, nú Dráttur var á vitjan.

Og KÍF royndi eisini tað, tær vóru mentar, at vinna neyðugu bóltarnar leygardagin. Fyrsta settið gekk av skrijðuni til, men síðani vóru tær alla tíðina væl við. Í longum løtum fingu tær lagt trýstið yvir á gestirnar, men tá mest stóð á, megnaðu tær ikki at halda fast, og tí gjørdist talan enn einaferð um eitt 3-0 tap.

Tað er tó einki at ivast í, at hóast niðurflytingin við hesum tykist staðfest, so fer KÍF eisini framyvir at tosa við, tá talan er um flogbólt í fremstu rað. Felagið hevur í fleiri ár havt góð úrslit at vísa á í yngru deildunum, og við royndunum, sum leikararnir nú hava gjørt sær, er lítið at ivast í, at roynt verður eftir eini skjótari afturvendan, tá kappast verður í fyrstu deild komandi kappingarár.